# *Formansfrágreiðing*

# *2021 – 2022*

Felagið Føroysk Ross

*Til aðalfundin 27. mars 2022*

## Nevndin 2021 - 2022

| | |
|---|---|
| *Formaður:* | Jóna Adelaide Ólavsdóttir |
| *Næstformaður:* | Jórun Sumberg-Olsen |
| *Kassameistari:* | Signa Kallsoy Joensen |
| *Tiltakslimur:* | Maria Joensen |
| *Tiltakslimur:* | Tóra Winther Reinert |

---

Árið 2021 var merkt av at nógv nýtt og øðruvísi hendi. Árliga merkir og skrásetir felagið tey fylini, sum koma, og hetta varð eisini gjørt í fjør. 7 fyl vórðu merkt og skrásett, harav 5 ryssufyl og 2 hestfyl. Felagið leggur seg eisini eftir at skipa alingina, og veita ráðgeving um paringar, men hóast ein lýsing varð løgd út, at fáa alarar at melda til aling, so gav hon ikki úrslit. Alingin fyri 2021 varð met lág, og rokna vit tíksil við met fáum fylum í 2022. Hetta meta vit vera orsaka av mettaða marknaðinum í Føroyum. Tað roynist torført hjá alarum at selja fyl og ungross, og eisini roynist torført at fáa nýggjar alarar at leggjast afturat.

Í 2020 byrjaði felagið at kanna ross fyri DMRT3 íleguna, eisini kallað "Tølt-genið". Í 2020 varð einki ross funnið við tølt-geninum, men í 2021 funnu vit endiliga nøkur ross, sum hava íleguna. Einans 8 av teimum 37 kannaðu rossunum hava íleguna fyri tølt. Harav er einans 1 ross, eitt ryssufyl, sum hevur AA. Tað vil siga, at einans eitt ross fer 100% at geva íleguna víðari. Hini 7 rossini hava CA, og tað er 50% kjansur fyri, at tey fara at geva íleguna víðari. Tað er eyðsæð, at við tí lágu alingini, sum er, so gongur skjótt at týna úr ílegu puljuni hjá føroyska rossastovninum.

Fyri at stuðla undir rætta og góða aling, hevur felagið fingið limaskap í Species360, og Maria Joensen, tiltakslimur í nevndini, er, vegna felagið, byrjað at skráseta ættartalvuna og upplýsingar inn í zims skipanina. Við Species360 hava vit atgongd til eina altjóða skipan, har vit kunnu rokna út, hvussu skilabest er at ala føroyska rossið grundað á, hvørji ross verða brúkt í alingini, har dentur verður lagdur á at halda innanrøring niðri og raðfesta ílegu fjølbroytni.

Vegna døpru útlitini hjá rossastovninum, varð ein undirskriftar innsavnan sett í verk, og áhugin fyri henni varð stórur. Yvir 1200 undirskriftir frá fakfólki, fakstovnum, alarum og áhugafólki

varð handað Magnusi Rasmussen, landsstýrismanni í umhvørvis- og vinnumálum. Magnus segðist taka málið í álvara, og ætla at arbeiða fyri málinum, men roknaði við tað fór at taka tíð. Enn hevur felagið ikki frætt nakað aftur frá umhvørvis- og vinnumálaráðnum um støðuna.

Í oktobur sendi felagið eina umsókn til fíggjarmálaráðið um at hækka stuðulin hjá felagnum á fíggjarlógini. Hóast fleiri í andstøðuni tóku undir við at hækka stuðulin, so varð málið fellt av samgonguni.

Í árslok av 2021 sendi felagið eina áheitan til landsstýrismannin um at hækka stuðulin til aliross, sum Búnaðarstovan umsitur. Áheitanin frá felagnum, saman við áheitanum frá eldsálum, ið fáast við rossini, gav úrslit, og stuðulin varð hækkaður. Greðingar fingu 10.000 kr. og aliryssur 5.000 kr. hvør.

Skrásetingarskipanin Føroya Fongur koyrir væl. Vit hava fingið økisnavnið foroyafongur.fo knýtt at skipanini, DMRT3 ílegan er løgd inn á øll kannaðu rossini, og tað ber til at leita í skipanini eftir rossum við hesi ílegu. Fleiri myndir eru lagdar inn, fyl skrásett og skipanin verður dagførd so hvørt.

Á Ólavsøku vóru føroysk ross at síggja niðri við Homluland. Pony-ríðing, søla av kalendarum og undirskriftar innsavnan gjørdi sítt til, at vekja ans fyri rossinum.

Á heysti 2021 kom ein nýggj barnabók á føroyska marknaðin. Ein góð og gevandi bók um føroyska rossið. Bókin er partur av krabbarøðini hjá Bókadeild Føroya Lærarafelags og Námi. Tað er Beinta Johannessen, sum hevur skrivað, og felagið hjálpti við fakligari viðgerð, og myndirnar, sum Cécile tók í 2020, prýddu bókina. Í samband við útgávuna av bókini var ein bókafamløga í Norðurlandahúsinum, og eisini varð prát um varðveiting av náttúru og djórasløgum har Maria frá NordGen, Jens Ivan frá Búnaðarstovuni og Jóna frá felagnum luttóku. Tiltakið eydnaðist sera væl.

Einki skeiðvirksemi var í 2021 vegna korona, men fyrireikingar og prát hava verið, og fyrsta skeiðið í ár, eitt skeið í at læra ross at draga vogn, verður um 14 dagar.

Myndakalendarin 2022 av føroyska rossinum seldi avbera væl, og allir limir felagsins fingu eitt ókeypis eintak. Í ár hevur felagið heitt á fleiri føroysk myndatøkufólk, um tey vilja stuðla við myndum, sum kunnu brúkast til myndakalendaran 2023 og aðra marknaðarføring. Fleiri hava víst hesum áhuga og verið jalig.

Í ársbyrjan sendi felagið eina umsókn um filmsstuðul til Mentamálaráðið, og hevur samskift við Polar Films og Høgna Mohr, um at framleiða ein dokumentar um føroyska rossið. Mentamálaráðið hevur boða frá, at roknast kann við svarið fyrst í apríl mánað.

Felagið hevur javnan havt nevndarfundir, og hevur eisini verið á fundum við Búnaðarstovuna og umhvørvis- og vinnumálaráðið. Sum áhugafelag kunnu vit gera stóran mun við varpa ljós á rossið og støðuna hjá rossinum. Vit kunnu gera stóran mun við at heita á almennar stovnar um at taka eitt tak við okkum og draga somu línu. Vit mugu standa saman, og fleiri vit eru, sterkari eru vit, og tess fleiri vit eru, sum taka eitt tak, tess longri og breiðari røkka vit.

Limatalið fer støðugt hækkandi, og tað er gleðiligt fyri felagið og føroyska rossið.

*Jóna Ólavsdóttir, formaður.*

*Vatnsoyrar 27. mars 2022*